# Dánjal kroystur at leggja kongin

**Nú sigur skjótt fyrrverandi FSF formaðurin, at tað ikki ber til bæði at vera fótbóltsformaður og at hava borgarliga starvið, sum hann hevur havt síðstu tíðina**

FSF-FORMAÐURIN
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Dánjal Andreasen legði týsmorgunin kongin, tá hann boðaði frá, at hann ikki tekur við afturvali sum FSF-formaður*

Tað hava verið ymiskar fráboðanir, og tað hevur ikki altíð verið so lætt at fylgja við í hvønn veg ymsu fráboðanirnar vendu. Men nú er eingin ivi. Dánjal Andreasen verður ikki formaður í Fótbóltssambandi Føroya, tá ið ársaðalfundurin hevur verið nú leygardagin.

Í tíðindaskrivi tíðliga í gjár boðaði FSF formaðurin frá, at hann ikki longur er valevni til formanssessin. Harvið er tað greitt, at formanstíðin hjá Dánjali Andreasen gjørdist tvey ár, og at Frithleif Olsen í Rituvík, sum nú er einasta valevnið, verður fjórði formaðurin í FSF.

Dánjal Andreasen sigur í tíðindaskrivinum, at tað er av persónligum og arbeiðsligum ávum, at hann nú hevur gjørt av at taka seg aftur, og at hann heldur ikki vil, at hansara persónur skal vera orsøk til stríð í FSF. Tað heldur hann tað vera, um tað hevði verið stríðsval um formanssessin á ársaðalfundinum, og tí hevur hann gjørt av at taka seg aftur.

Upp á ein máta kemur tað óvart á, at Dánjal Andreasen nú hevur boðað frá, at hann ikki er valevni. Upp á ein annan máta er tað ikki so óvæntað.

### Formansfrágreiðingin

Tað kemur óvart á, tí Dánjal Andreasen í síðstu viku týðuliga og klárt undirstrikaði, at hann ongar ætlanir hevði um at leggja frá sær. Á limafundi við feløgini í november í fjør, tá ið tikið varð saman um kappingarárið og tosað varð um nýggja árið, boðaði Dánjal Andreasen frá, tá ið fundurin var um at vera liðugur, at hann ætlaði at bjóða seg fram til eitt nýtt tvey ára skeið sum formaður. Hann segði seg at hava hoyrt tos um, at hann ikki ætlaði at stilla uppaftur, men hann segði seg ikki skilja, hvaðani hesi tíðindini komu.

Í síðstu viku var Christian Andreasen, sum hevði tikið seg aftur sum nevndarlimur, rættuliga hvassorðaður um formannin. Christian segði, at Dánjal Andreasen hevði greitt boðað frá, at hann ikki fór at stilla uppaftur sum FSF formaður. Hetta var Dánjal púra ósamdur við honum í. Dánjal segði í Sosialinum undan vikuskiftinum, at tað einasta, sum hann hevði sagt um hetta, var, at frammanundan at hann tók við borgarliga starvinum, sum hann nú hevur, hevði hann ivast í, um tað bar til at røkja tað starvið og samstundis vera FSF formaður. Tað segði hann seg nú hava funnið út av bar væl til, og tí bjóðaði hann seg fram eina ferð afturat.

Nú eina lítla viku seinni kann so staðfestast, at Dánjal Andreasen hevur funnið út av, at tað ber ikki til at vera FSF formaður og samstundis at røkja starvið, sum hann er í. Tað kann ikki undra, um hetta kennist undarligt.

### Advokattrýstið

At tað ikki er so óvæntað, at FSF nú skal hava nýggjan formann, kemst av sera markanta leiklutinum, sum Christian Andreasen, sum hevur verið nevndarlimur í tvey ár og sum ikki stillar uppaftur, hevur havt hesar seinastu dagarnar í spurninginum um FSF formannin.

Christian Andreasen úttalaði seg í síðstu viku óvanliga markant um, at Dánjal Andreasen ikki var egnaður at vera FSF formaður, og um at Dánjal ikki hevði hildið lyftið, sum hann segði, at Dánjal hevði givið um, at hann ikki fór at bjóða seg framaftur. Christian segði eisini, at hann ikki kundi sita í nevnd við hesum formanninum, og tað var orsøkin til, at hann hevði tikið seg aftur sum nevndarlimur. Tað er eingin ivi um, at Christian Andreasen hevur havt stóran leiklut, tá ið brævið varð orðað, sum fríggjdagin varð lagt á heimasíðuna hjá Norðlýsinum og sum var í Sosialinum í gjár, og sum var frá meirilutanum í FSF nevndini og til FSF formannin.

Tað er ikki komið nakað alment fram um, hvat er farið fram aftaná, at FSF formaðurin ikki hevði aðrar viðmerkingar til skjótt fyrrverandi nevndarlimin enn, at hetta ikki skuldi viðgerast í fjølmiðlunum, men at aðalfundurin skuldi tala.

Hvat síðani er farið fram, ber illa til at fáa nakrar almennar viðmerkingar um. Men tað skilst á øllum brøgdum, at trýstið á sitandi formannin er økt seinastu dagarnar. Týsmorgunin legði FSF bossurin so kongin, og nú verður Frithleif Olsen í Rituvík nýggjur FSF formaður. KÍ, B68 og B71 skutu hann upp hósdagin í síðstu viku, og fimm dagar undan aðalfundinum er tað greitt, at hann verður FSF formaður.



*Christian Andreasen úttalaði seg í seinastu viku óvanliga markant um sitandi formannin, og eftir øllum at døma hevur hetta vigað sera tungt í stríðnum, sum hevur gingið fyri seg seinastu dagarnar*

## Fráboðanin

**Soljóðandi skriv varð týsmorgunin sent føroysku fjølmiðlunum**

»Við hesum skal verða sagt frá, at eg taki meg aftur sum valevni sum formaður fyri FSF.

Avgerð mín er tikin av persónligum ávum, herundir orsakað av míni arbeiðsbyrðu í mínum dagliga yrki.

Eisini er avgerð mín grundað á, at eg meti tað vera best fyri FSF, at feløgini standa saman um eitt valevni til aðalfundin. Eisini er tað mítt ynski, at mín persónur ikki skal verða orsøk til stríðsspurningar innan FSF og út frá eini heildarmetan meti eg tað vera best fyri áhgumálini hjá FSF, at tað ikki verður stríðsval um formannin á komandi aðalfundi í FSF.«

**Dánjal Andreasen**
**Leirvík**



# Mjølnir reistir fyri aðru ferð

**Annað vikuskiftið á rað komu klaksvíkingar aftur, eftir at hava ligið tvey sett undir**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Mjølnir hevur nú tikið við favoritt-heitinum í bestu mansdeildini í flogbólti.

Um vikuskiftið vóru fuglfirðingar á vitjan, og talan gjørdist um ein dyst, sum varð júst so javnur, støðan á talvuni bendi á, at hann fór at verða.

Her vóru liðini nevnliga jøvn undan dystinum, men fyrstu løtuna var tó ikki so nógv, sum bendi á, at talan skuldi gerast um so javnan dyst. Eins og í dystinum móti SÍ fyri viku síðani gekst illa í hond hjá Mjølni fyrstu settini. Fuglfirðingar tóktust hava beina kós móti gullinum, tá teir tóku næsta settið somikði sannførandi sum 25-15. Fyrsta settið høvdu teir eisini vunnið, og nú tóktust klaksvíkingar av álvara at vera á knøunum.

Men enn einaferð reistist Mjølnir. Ivaleyst hevur sigurin á SÍ víst, at tað kann loysa seg at stríðast sum ein heild, og tað var júst tað, sum liðið nú aftur gjørdi. Hóast talan nú gjørdist um jøvn og spennandi sett, so megnaðu klaksvíkingarnir alla tíðina at halda sær omanfyri, og ta teir so eisini tóku javnbrótaran, máttu eisini fugfirðingar ásanna, at her gjørdist einki.

Og skal tosast um heiðursmerki í Klaksvík, so er landskappingin einasta staðið, at hesi kunnu fáast til høldar. Steypafinaluni eigur Klaksvikin ongan part í hesaferð, og tí man góða gongdin hja bæði monnum og kvinnum smakka eyka væl nú.



*Klaksvíkingar vóru tvey sett aftanfyri, men enn einaferð reistist Mjølnir, og nú eru teir á odda í meistaradeildini hjá monnum*

*Mynd: SáH*

### Trygt hjá SÍ

Hin dysturin um vikuskiftið var í Sørvági, har SÍ var á vitjan, og her var eingin ivi. Sørvingar snægt sagt vundu burturúr Fleyr, og tó at seinasta settið ikki hevði heilt so stóran mun sum hini, so var ongan tíð nakar vandi fyri, at Fleyr sum so skuldi pynta um munin.

Soleiðis halda sørvingarnir framvegis fast í vónini um, at tað kanska fer at bera til hjá liðnum at gera seg galdandi, tó at tað skal lagað seg óvanliga væl, um teir skulu røkka heilt upp á tindarnar. Men ikki minst, so kann tað roknast við, at teir verða partur av nøkrum lykladystum í landskappingini, har teir enn eiga heimadyst móti bæði Mjølni og ÍF.

# Aftur altjóða dómari

**Hesaferð verður tað 44 ára gamli Aage Christensen, sum verður altjóða ískoytið til flogbóltsfinalurnar**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Tað verður Aage Christensen, sum verður høvuðsdómari, tá flogbóltsfinalurnar verða leiktar um vikuskiftið*

Tað kann ikki sigast annað enn, at Flogbóltssambandið ger nógv burturúr, tá steypafinalurnar eru á skránni.

Eitt nú hevur tað verið vanligt, at útlendskur altjóða dómari hevur verið til dystirnar, og soleiðis verður eisini í ár. Hesa ferð verður tað 44 ára gamli Aage Christensen, sum er settur sum fyrstidómari í teimum báðum finalunum, og afturat sær fer hann so at hava tveir royndar harrar úr føroyska flogbóltsheiminum. Nevnliga Tummas Óla Hansen og Jan Hentze.

Teir báðir havnarmenninir hava júst verið í Danmark til dómarapróvtøku, men enn fyriliggur so ikki endaliga úrslitið av, hvussu skoðsmálið frá donsku eygleiðarunum var.

Um Aage Christensen er annars at siga, at hann er ein ógvuliga royndur harri. Síðani 1980 hevur hann verið divisiónsdómari í Danmark, og gjøgnum árini er talan vorðin um umleið 850 dystir í donsku deildunum. Hartil hevur hann dømt fleiri aðrar stórar dystir, so sum finaluna í unglinga-OL í 1999 og kvinnufinaluna í U-19 HM kappingini sama árið. Eisini í fjør var hann partur av nøkrum stórum dystum, so sum donsku steypafinaluni og finaludystinum í World Cup Grand-Prix kappingini fyri kvinnur.

# Sum væntað

**Eingi óvæntað úrslit vóru í kvinnudeildini, har Mjølnir framvegis heldur fast um oddastøðuna**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*ÍF gjørdi ein lítlan vørr, men tær megnaðu tó ikki av álvara at loypa hvøkk á Mjølnir, sum eisini í kvinnudeildini heldur fast um møguleikan fyri gullinum*

*Mynd: SáH*

Tríggir dystir vóru á skránni í meistaradeildini hjá kvinnum, og úrslitini í hesum vóru øll soleiðis, sum roknað varð við.

Tað var tó heldur óvæntað, at ÍF skuldi geva Mjølni somikið dygga mótstøðu, sum tær gjørdu. Mjølnir tóktist annars hava alt í tryggari legu her, men í triðja settinum gjørdi ÍF ein vørr, soleiðis at veruligur spenningur aftur kom í. Tað eydnaðist tó royndu kvinnunum á heimaliðnum at tveita skelkin av sær, og við sigrinum halda tær framvegis fast í møguleikanum um sjálvar at gera av, hvar FM-heitið skal fara. Avgerandi dysturin her verður helst tann á heimavølli móti TB, sum er á skránni annað vikuskiftið.

Tveir aðrir dystir vóru á skránni um vikuskiftið. TB fekk væntaða 3-0 sigurin á KÍF, men hóast hetta, so var tó merkisvert, at munurin í einstøku settunum var so lítil, sum hann veruliga var.

Seinasti dysturin var millum Drátt og Fleyr, og her gjørdu tær hjá Drátti púrasta bart. Fleyr slapp at spæla við fyrsta settið, men tá Dráttur so setti ferð á, var einki roks.

## Hondbóltsstøður

**1. Deild kvinnur**

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Stjørnan | 4 | 3 - 0 - 1 | 409 | 326 | 83 | 17 |
| 2 | VB | 4 | 4 - 0 - 0 | 425 | 322 | 103 | 16 |
| 3 | VÍF | 4 | 2 - 0 - 2 | 407 | 342 | 65 | 13 |
| 4 | Neistin | 3 | 2 - 0 - 1 | 385 | 339 | 46 | 12 |
| 5 | StÍF | 3 | 0 - 0 - 3 | 334 | 396 | -62 | 5 |
| 6 | Søljan | 3 | 1 - 0 - 2 | 286 | 367 | -81 | 4 |
| 7 | Kyndil | 3 | 0 - 0 - 3 | 242 | 396 | -154 | 1 |

## Flogbóltsstøður

**Meistaradeild, kvinnur**

| | | d | v - t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | TB | 15 | 12 - 3 | 39 | 12 | 27 | 16 |
| 2 | Mjølnir | 15 | 12 - 3 | 39 | 14 | 25 | 16 |
| 3 | Dráttur | 15 | 8 - 7 | 31 | 26 | 5 | 12 |
| 4 | ÍF | 15 | 6 - 9 | 22 | 30 | -8 | 8 |
| 5 | KÍF | 14 | 5 - 9 | 19 | 34 | -15 | 5 |
| 6 | Fleyr | 14 | 1 - 13 | 7 | 41 | -34 | 1 |

**Meistaradeild, menn**

| | | d | v - t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Mjølnir | 12 | 11 - 1 | 33 | 8 | 25 | 15 |
| 2 | ÍF | 12 | 10 - 2 | 32 | 9 | 23 | 13 |
| 3 | SÍ | 12 | 6 - 6 | 23 | 20 | 3 | 8 |
| 4 | Fram | 12 | 2 - 10 | 9 | 31 | -22 | 2 |
| 5 | Fleyr | 12 | 1 - 11 | 5 | 34 | -29 | 2 |

## Flogbóltsúrslit

**Meistaradeild kvinnur**

KÍF-TB 0-3 (19-25, 21-25, 18-25)
Mjølnir-ÍF 3-1 (25-19, 25-11, 22-25, 25-19)
Dráttur-Fleyr 3-0 (25-23, 25-14, 25-7)

**Meistaradeild menn**

Mjølnir-ÍF 3-2 (22-25, 15-25, 25-22, 25-20, 15-11)
SÍ-Fleyr 3-0 (25-17, 25-11, 25-20)